## Marjun Kalsø, Mjølnir:

– Sigurin hjá okkum var ov lættur. Fleyr eigur – og plagar eisini – at geva okkum meira mótstø›u enn tær gjørdu leygardagin. Vit høvdu sagt, at vit skuldu tr‡sta tær vi› servuni frá byrjan og ta› rigga›i øgiliga væl, sigur Marjun.

Hon heldur orsøkina til grei›a sigurin vera, at tær lata Fleyr gera mistøkini og brúka orkuna upp á sítt egna spæl.

– Vit tr‡sta eisini mótstø›uli›i› alla tí›ina. Vit sláa meira enn tær gera, og ta› merkir, at tær fáa ikki fri› at byggja sítt spæl upp. Umvent sláa tær ikki nóg nógv og ta› gevur okkum ta tí› vit hava fyri ney›ini at fáa okkara álopsspæl at sita væl, leggur hon afturat.

## Mariann Øster, Fleyr

– Vit eiga ikki at spæla so illa sum vit gera í dag. Móttøkan fer av lagi beinanvegin og tær fáa fleiri stig á ra›, og ta› er ikki ney›ugt. Hóast vit hanga í, so fáa vit ikki heinta› handan munin innaftur og so fara vit ni›ur vi› nakkanum, sigur Mariann.

Hon heldur, at ta› eisini hevur naka› vi› ta› at gera, at fleyrleikararnir eru ikki nóg skjótir í at umstilla seg til broyttar umstø›ur.

– Vit avtala at spæla á ein hátt, men tá Mjølnir hevur lisi› ta› av, so eiga vit at broyta okkara spæl, men tann parturin svíkur. Kanska tí at vit hava ov stóra vir›ing fyri teimum, sigur Mariann.

Fleyr-Mjølnir 0-3 (18-25, 14-25, 15-25)

# Ongin mótstø›a frá Fleyr

**Gassi› er fari› úr gamla klassikaranum í flogbólti. Munurin millum Mjølnir og Fleyr er so stórur í løtuni, at eingin spenningur er um, hvør vinnur tá li›ini hittast og ta› er spell, tí ta› n¦tist ikki vera so**

FLOGBÓLTUR
*kvinnur*

*Ta› sum fyrr var klassikarin líkist nú mest einum avgrei›sluspurningi. Leygardagin hev›i Fleyr ongan møguleika, tá tær dysta›ust móti Mjølni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Solei›is var ta› í hvussu er ikki í gomlum døgum. Tá braka›i ta› í, tá li›ini hittust, og ásko›arin kundi vera vísur í, at leikararnir stríddust á vøllinum. Tíverri er ein partur av hesum horvin í dag, og fyrr enn tann andin kemur aftur í leikin kemur spenningur aftur í dystirnar millum li›ini.

### Nógv sterkari

Ta› er einki at dylja yvir, at Mjølnir er ta› sterkara li›i› í løtuni. Um ta› kortini er so nógv betri, sum settúrslitini siga, er kortini ivasamt, og tí er ta› helst eisini anna› enn spæli›, sum ger seg galdandi tá til stykkis kemur.

Eingin ivi er um, at spæli› hjá Mjølnir er sera væl skipa›, og ta› er sjáldan, at meistarali›i› úr Klaksvík spælir ein bólt yvir um neti› vi› fingraslagnum, sum kann sláast. Ta› ljó›ar kanska ikki av so nógvum, men ta› merkir í roynd og veru, at Mjølnir alla tí›ina leggur tr‡st á móttøkuspæli› hjá mótstø›uli›num.

Og ta› var júst móttøkuspæli› hjá Fleyr, sum sveik so grúvuliga leygardagin. Mjølnir leg›i seg eftir at tr‡sta Fleyr í servumóttøkuni og ta› eydna›ist til fulnar í byrjanini. Kortini var ta› júst í fyrsta settinum, at Fleyr so dánt klára›i at fylgja vi› Mjølnir, men ta› var so verri enn so nóg miki› til at taka stig frá teimum.

Til ta› vóru klaksvíksdámurnar ov sterkar.

### Ikki í sterkastu uppstilling

Hóast Mjølnir vann ein grei›an sigur leygardagin, so var li›i› ikki komi› til Havnar vi› sterkastu uppstilling. Vera Larsen og Tina Jacobsen vóru ikki vi› á li›num og ta› gav tveimum heilt óroyndum leikarum møguleikan í bestu deildini.

Ein teirra var Katrin Petersen, sum spældi libero og hesum kom hon bara heilt væl frá.

Og júst hetta er kanska ein annar lykil til gátuna um, hví Mjølnir so ofta vinnur á Fleyr.

Ta› kann vera, at tær duga betri at seta n‡ggjar leikarar vi› í røttu løtuni enn Fleyr dugir. Seinastu árini hava fleiri n‡ggir leikarar fingi› møguleikan á besta li›num hjá klaksvíkingum og hóast ta› ikki altí› er blivi› til so nógvar bóltar, so hava tær veri› vi›, og fingi› tevi› av sigrinum. Júst hetta er gó› barlast at hava vi› sær næstu fer› ein skal hitta sama li›i›.

### Mugu leggja meira fyri

Hóast tapi› leygardagin, so er Fleyr enn á tri›japlássinum, nú kappingin er komin í helvt. Mjølnir og Dráttur hava 18 stig me›an Fleyr hevur tíggju. Nú vera so stigini deild vi› tvey og ta› ger so, at munurin upp á átta stig bert ver›ur til f‡ra, og ta› er ikki verri enn, at ta› kann heintast innaftur.

Men so skal ganga væl hjá Fleyr og knappliga so væl hjá hinum bá›um.

Men ta› er so greitt, at skal Fleyr gera sær nakrar tankar um at vinna á Mjølnir og Drátti, so skulu tær trúgva meira upp á seg sjálvar. Trúgva uppá, at tær megna at vinna á li›um, sum tær hava tapt ímóti í landskappingini í fleiri ár, og ta› er ikki ómøguligt, tí tær hava jú vunni› á teimum í ø›rum sambandi.

ÍF–TB 0–3 (21-25, 22-25, 21-25)

# TB vann uppibori ›

**Unga TB li›i› er kanska partur av oddinum, men at tær eru væl betri enn botnurin lótu tær ongan iva vera um**

FLOGBÓLTUR KVINNUR

TB hevur ikki havt eydnuna vi› sær hetta kappingarári›. Ímóti Drátti vóru tær frammanfyri 2-0 men lorka›u alt burtur og taptu. Eisini hava tær tapt tepurt fyri ÍF og Fleyr, og um ta› ikki var, so hev›i TB veri› vi› í oddastrí›num. Nú liggur li›i› á 4. plássi naka› aftanfyri Drátt og Mjølnir.

Í hesum dystinum var li›i› hjá TB væl fyri. Spæli› gekk væl, og allir leikararnir kempa›u fyri hvønn einasta bólt. Li›i› er rættiliga ungt og óroynt, og tí hava mistøkini veri› heldur nógv, men í hesum dystinum var av tí fræga vi› tí.

Álopsspæli› er einki at reypa av, tí genturnar eru naka› varnar, tá i› tær skulu smasha, og tí manglar ofta onkur, sum kann avgera álopini. So var eisini í hesum dystinum.

### TB langt frammanfyri

TB vísti frá fyrsta bríkslí, at hesin dysturin skuldi vinnast. Alt gekk sum eftir ánni, og skjótt var munurin ni›ur til ÍF stórur. Stø›an var einafer› 18-8, men ÍF dugir eisini at spæla flogbólt, og nú kom vend í. TB-li›i› ste›ga›i upp, og ta› hevur veri› gongdin í fleiri dystum. ÍF tók yvir, og skjótt stó› á jøvnum 20-20. Helen á Lakjuni, sum spælir á mi›juni hjá ÍF, fekk tær flestu hevingarnar og vann nógv. Blokkurin hjá TB megna›i ikki at ste›ga henni, og tí sá út sum um, at ÍF fór at taka setti›. Virgar Djurhuus, venjari hjá TB, royndi at eggja sínum leikarum, og ta› eydna›ist, tí TB setti ein gó›an endaspurt inn, og setti› var› vunni›.

Í 2. og 3. setti var TB alla tí›ina nøkur stig frammanfyri, men tó var alla tí›ina spenningur í. Spæli› var naka› deydligt, tí bæ›i li›ini vóru varin í álopsspælinum. TB vísti í hesum dystinum, at li›i› nú virkar sum ein eind. Hvør leikari kempar og tekur ábyrgd á seg, og ta› hevur mangla› fyrr í kappingarárinum. Hjá ÍF er spæli› alt ov svingandi. Li›i› hevur spælt onkrar heilt gó›ar dystir, men teir seinastu hava veri› undir mi›al. Stø›an hjá ÍF líkist nógv teirri hjá TB, tí nakrir dystir hava veri› javnir, men eru koppa›ir skeivan veg. Li›num manglar sjálvsálit, og ta› kemur bara vi› einum gó›um sigri, men ta› má bí›a til eftir jól. Tá i› kappingin ver›ur tikin upp aftur í januar eru stigini koyrd í helvt, og ta› ger, at spenningur aftur kemur í kappingina.



Fleyr-Mjølnir 0-3 (21-25, 18-25, 13-25)

# Fleyr smurdir av

**Ta› var bara í fyrsta setti at Fleyr gjørdi ein vørr. Í teimum bá›um seinnu settunum var ta› bara ta› eina li›i› á vøllinum og hóast teir ikki spíla›u seg út, vann Mjølnir ein grei›an 3-0 sigur á Fleyr í Havn**

FLOGBÓLTUR MENN

Mjølnir vann ein grei›an og uppibornan sigur á Fleyr í Havn leygardagin. Klaksvíkingar vunnu dystin 3-0 og tá fyrsta sett var fari› afturum, var› munurin stórur. Í ø›rum setti fekk Fleyr 18 og í tri›ja bert 13 stig og tí var í roynd og veru talan um ein avsmurning.

Solei›is gjørdist ta›, men ta› var ikki fyri ney›ini.

### Kundi fari› bá›ar vegir

Í fyrsta setti leika›i javnt á. Li›ini fylgdust ein stóran part av settinum uttan at ta› eydna›ist nøkrum at sleppa frá hinum. Móti endanum av settinum fóta›i Mjølnir sær kortini og fekk teir bóltarnar, sum teir høvdu fyri ney›ini og so var setti› heima.

Í hesum settinum var spæli› til tí›ir sera gott, og hóast »duellirnar« kundu veri› longri, so stríddust li›ini óført um yvirvágina.

Tá til stykkis kom, var ta› í roynd og veru avger›in sum fall, tá Mjølnir tók fyrsta setti heim. Spæli› hjá Fleyr datt sundur og teir megna›u ongantí› at rætta ta› mista uppaftur, og tí gjørdist munurin bara størri.

Og ta› ringasta av øllum fyri teir var, at spæli› hjá Mjølnir var ikki naka› at reypa av heldur. Teir gjørdu ta›, sum teir høvdu fyri ney›ini og ikki nógv meira enn ta›. Teir tr‡stu Fleyr í móttøkuni og ta› megna›i – tann annars so stø›uga móttøkan – einki at gera vi›.

### Jóannes skaddur

Eitt, sum kundi fingi› t‡dning fyri dystin, men sum kortini ikki fekk ta›, var at Jóannes Poulsen hjá Mjølnir mátti út vi› keiktum fóti í byrjanini av ø›rum setti. Jóannes hev›i leikt væl í fyrsta setti, men var so óheppin at skeikla sær fótin, og tí mátti hann fara av vølli.

Havandi í huga, at munurin í fyrsta setti var lítil og ska›an, so var væntandi at Fleyr fór at gera ein vørr, men so var ikki. Rúni Elttør kom inn og hann var ein dyggur avloysari. Eingin saknur var í Jóannesi, og Fleyr smokka›i alsamt meira ni›ur í millum.

Ringa móttøkan hjá Fleyr hev›i vi› sær, at álopi› gjørdist ikki tann hóttanin sum ney›ugt er fyri at vinna móti Mjølnir. Samstundis er at siga, at blokkadan hjá Mjølnir klára›i seg rættiliga væl henda dagin.

### Ov linir í kongunum

Stutta ni›urstø›an eftir dystin leygardagin er, at Fleyrleikararnir vóru ov linir í kongunum. teir løgdu ikki nóg hart tr‡st á Mjølnir og tí fingu klaksvíkingarnri nógv lættari spæl enn ney›ugt. Í sta›in fyri at sláa og á tann hátt leggja tr‡st á Mjølnir, spældu teir bóltarnar yvir um vi› fingraslagnum, og ta› ger tú ikki órevsa›ur. Mjølnir takka›i fyri og leyp á afturímóti.

Úrsliti› hevur vi› sær, at Mjølnir hevur fjúrtan stig nú kappingin er komin í helvt. ÍF kemur teimum á baki, sí›ani Fram og sí›ani Fleyr. Skal Fleyr gera sær nakrar tankar um hei›ursmerkir, so skulu teir vakna úr dvala nú.

Gullmerkini skulu teir gloyma alt um vi› tí spælinum teir vístu leygardagin, tí ta› heldur ikki langt. Hinvegin vita tey flestu, og best av øllum teir sjálvir, at teir kunnu spæla nógva fer›ir betri enn ta› teir vístu móti Mjølnir.



*Vi› sigrinum á Fleyr er Mjølnir nú trygt á odda í bestu mansdeildini*

ÍF – Fram 3 – 1 25-22, 25-18, 16-25, 25-23)

# Betra li›i› vann

**Nú komi› er í helvt í flogbóltskappingini, hevur ÍF sett seg tungt á næstfremsta plássi›**

FLOGBOLTUR MENN

Javnur og spennandi dystur var› leygardagin leiktur á Kambsdali. ÍF og Fram hittust. Bæ›i li›ini høvdu sigurin fyri ney›ini, skuldi oddali›i› Mjølnir ikki sleppa alt ov langt framum. ÍF dró longra strái›.

### Fram byrjar væl

Í 1. setti var ta› Fram, sum byrja›i betur. ÍF leikararnir vóru ikki rættiliga klárir og vi› gó›um og fjølbroyttum spæli, tók Fram seg væl framum. Sum settinum lei› kom ÍF fyri seg, og spakuliga vunnu teir lei›sluna innaftur. Fram spældi ikki verri, men ÍF spældi bara betur, og endin var, at ÍF vann setti›. Móttøkan hjá Fram var í hesum settinum ikki nóg gó›, og tí kom Romica Pascu inn at spæla í 2. setti.

### ÍF bukar Fram

Nú var ÍF komi› vi› í dystin, og í 2. setti banka›u teir Fram. Móttøkurnar hjá Fram vóru ikki nóg gó›ar, og leikararnir gjørdu alt ov nógv mistøk. Kenneth Neshamar, Boban Ilic og Bartal Eliasen smasha›u allir væl fyri ÍF í øllum dystinum, og teir fingu nógvar hevingar. Blokkurin hjá Fram vann alt ov líti›, og verjuspæli› afturí á vøllinum gekk eisini alt ov illa.

Nú mátti vend koma í hjá Fram, skuldi naka› fáast vi› aftur til Havnar. 3. setti› var ta› javnasta, og li›ini fylgdust leingi. Romica Pascu í Fram fór sí›an at serva, og vi› hør›um hoppservum vann hann 7 stig, so Fram leg›i seg á odda 20-15, og ta› lei›sluna lótu teir ikki fara.

### Spennandi endi

Dysturin var nú aftur javnur, og li›ini stríddust manniliga í 4. sett. Leingi gekk javnt á, men so vann ÍF nøkur stig á ra› og komu fram til dystarbólt 24-19. Fram royndi at strí›ast, og rættiligur spenningur kom í, tí ÍF megna›i ikki at vinna seinasta stigi›. Fram ota›i seg longur inn á ÍF, og stø›an gjørdist 24-23. Fram servar og ÍF fer í álop, men blokkurin hjá Fram ste›gar álopinum. Bólturin fer ikki í gólvi›, og ÍF fer tí aftur í álop, men aftur hesafer› blokkar Fram.

Á tri›ja sinni roynir ÍF at avgera dystin, og hesafer› fer bólturin framvi› blokkinum hjá Fram, men eingin kraft er í slagnum, so lætt skuldi› veri› hjá Fram tiki› ímóti. Bólturin ver›ur tó so miki› illa móttikin, at hann endar í antennuni á netinum, og ver›ur tí dømtur úti, og ÍF hevur vunni› dystin. Hev›i Fram bara havt vunni› tann bóltin so…

### Vi› merking:

Rúni Weihe er li›forma›ur hjá Fram. Hann helt eftir dystin, at teir gjørdu ov nógv mistøk fyri at vinna.

– Spæli› hjá okkum var sera gott vi›hvørt, men so ste›gar alt upp, og vit koma ikki í gongd aftur. Ta› hevur veri› trupulleikin í fleiri dystum. Blokkurin hjá okkum vinnur alt ov líti›, og ta› leggur tr‡st á álopi›, tí ta› er har vit vinna stigini. Seinasta móttøkan var ógvuliga sigandi fyri alt verjuspæli› hjá okkum, tí hatta er ein bóltur, i› ikki skal kiksast. Vit eru ikki nóg konsentrera›ir og ta› kostar.

Dráttur – Fossanes 3 – 0 (25-16, 25-10, 25-17)

# Dráttur í topp - Fossanes í botn

**Oddali›i› Dráttur tók ímóti botnli›num Fossanesi. Sigurin hjá Drátti var eisini grei›ur, og rættiliga stórur munur var á li›unum. Her skal eisini havast í huga, at á li›num hjá Drátti spældu Marina Popovich og Helga Nordendal ikki vi›. Tær eru fastar á li›num**

FLOGBÓLTUR KVINNUR

Fossanes átti sín stóra leiklut í hesum dystinum, tí tær stríddust væl og lótu ikki Drátt fáa stigini lættliga. Fossanes megna›i at halda tørn rættiliga leingi í hvørjum setti, men at hótta Drátt megna›ur tær ikki.

### Nøgdur hóast alt

Jón Kári Frederiksen, sum venur Fossanes, er væl nøgdur vi› gongdina higartil í landskappingini, sjálvt um Fossanes enn ongan dyst hevur vunni›.

– Vit vistu, at ta› fór at vera torført fyrsta ári› í meistaradeildini. Eingin av leikarunum hevur roynt at spælt vi› í meistaradeildini fyrr, og elsti leikarin á li›num er bara 23 ár. Men genturnar strí›ast væl, og framgongdin er stór.

Eg vænti, at vit fara at vinna okkurt setti› skjótt, og so kanska onkur sigur kemur eisini. Genturnar eru ágr‡tnar og hugagó›ar, men at tapa hvørja fer› styrkir sjálvandi ikki sjálvsáliti›, og ta› er serliga har, li›i› er veikt. Spæli› hjá okkum ste›gar upp, og so tapa vit ov nógv stig í einum, men alt samalt kemur vi› tí›ini.